DAGSINS MEINING

Aftur í skúla

Í komandi viku fara børnini aftur í skúla. Barnatalið økist, og verða komandi árgangir helst stórir. Ættarliðið, ið nú skal slíta sínar barnaskógvar í føroyska fólkaskúlanum, skal einaferð taka við hesum landi. Ábyrgdin liggur tungt á okkum at geva hesum komandi ættarliði bestu kor í einum støðugt skiftandi heimi.

Ein máti at geva hesum børnum bestu møguleikar er at hava eina fólkaskúlaskipan, ið fyrireikar børn og ungdóm til lívið eftir ár 2000. Vit hava í løtuni eina fólkaskúlalóg, ið ikki verður fylgd út í odd og egg, vegna ov lága játtan á fíggjarlógini, og tí eru framvegis ting, ið eru sambært gomlu fólkaskúlalógini, og helst áttu at ligið eftir í farnu øld. Hetta er ein landstrupulleiki, og má man fyrr ella seinni gjalda tað, lógin kostar, ella broyta fólkaskúlalógina. Hetta seinna hevði verið eitt afturstig, og kemur tað tí helst ikki uppá tal.

Skúlaverkið er annars eitt dømi, har kommununar í flestum førum liva fyrimyndarliga upp til sína ábyrgd. At sleppa í skúla uttan bíðilistar er í dag ein sjálvfylgja. Land og kommunur gjalda kostnaðin av upptøku av øllum børnum í skúlaaldri, og hevði tað aldrin verið góðtikið, um onkur kommuna innførdi bíðilistar til fyrsta flokk.

Hví skal kommunal barnaansning verða øðrvísi? Kanska kundi man hugsað sær eina skipan, har kommunur fyrst og fremst betaltu skúla og barnaansing til øll, og so kundu tær lagt fíggjarætlan fyri restina. Raðfestingin er ikki góð nokk hjá summum kommunum. Tað er møguligt, at íløgukarmurin, ið ikki ger mun á skúla- og barnagarðsbygging og bygging av eitt nú kommunalum rulliskoytubreytum, hevur part av ábyrgdini.

Yvirforeinklað kundi man sagt: fyrst skúlar og barnaansing, og so annað fyri rest. Letur man kommunur sleppa at velja ímillum barnansing og ítrottarhallir, ja so vita vit av søguligum royndum, hvat fleiri kommunur velja. Ansingartrygd – ongantíð ov skjótt.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

»Føroyski« virðisbrævamarknaðurin verður íslendskur

Kristina Háfoss
løgtingskvinna fyri Tjóðveldisflokkin

Fyri stuttum varð endaliga avgjørt, at farast skuldi undir skipan av føroyskum virðisbrævamarknaði. Hetta vóru gleðilig tíðindi. Tað gjørdist tó skjótt greitt, at føroyski virðisbrævamarknaðurin ikki verður av nøkrum, men at talan bert verður um, at føroyingar um stutta tíð fáa møguleika fyri, at gera íløgur, skráseta fyritøkur v.m. á íslendska virðisbrævamarknaðinum – eins og í dag – men tá umvegis eina føroyska heimasíðu.

Fyri knapt tveimum árum síðan varð partafelag sett á stovn við tí endamáli, at seta á stovn ein føroyskan løggildaðan (autoriseraðan) virðisbrævamarknað soleiðis, at føroyskar fyritøkur kundu skráseta seg og fáa kapital á henda hátt, og soleiðis at føroyingar, stovnar, fyritøkur v.m. fingu høvi, at gera íløgur í føroyskt vinnulív, heldur enn at seta pening í banka ella í útlendskar ílogur o.a. Viðtøkurnar fyri partafelagið vóru tó seinni broyttar soleiðis, at tað ikki varð neyðugt fyri partafelagið at seta á stovn føroyskan virðisbrævamarknað, men kundi partafelagið eitt nú heldur skipa fyri samstarvsavtalu við útlendskan virðisbrævamarknað. Hetta gav møguleika fyri tí loysn, ið er vald í dag.

Løggildað marknaðarpláss

Tá tosað hevur verið um at seta á stovn ein føroyskan virðisbrævamarknað, hevur møguleikin við at skipa hann sum eitt sokallað »løggildað marknaðarpláss« verið sera viðkomandi. Hetta er ein mini-útgáva av einum stórum virðisbrævamarknaði. Eitt nú verða minni krøv sett til fyritøkur, ið ynskja at skráseta seg á tílíkum virðisbrævamarknaði enn á einum stórum virðisbrævamarknaði, og er hetta neyðugt, um fleiri føroyskar fyritøkur skulu verða skrásettar á virðisbrævamarknaðinum.

Lítil marknaður – men stóran týdning

Ein tílíkur føroyskur virðisbrævamarknaður vildi verið lítil í altjóða høpi, men kundi fingið stóran týdning fyri føroyska virðisbrævamentan, fyri føroyskar fyritøkur, ið ynskja at fáa meira kapital, eins væl og fyri persónar, stovnar v.m., ið ynskja at gera íløgur í føroyskt vinnulív.

Føroyska uppsparingin er stór í løtuni og vildi ein føroyskur virðisbrævamarknaður uttan iva týtt, at væl størri partur av tí peningi, sum í løtuni »svevur« í bankum, sparikassum og tryggingarfeløgum, sum uppsparing og íløgur uttanlands – vildið »vaknað« í føroyskum høpi, og verið nýttur sum íløga í føroyskt vinnulív.

Nevnast kann somuleiðis, at samgongan hevur ynskt, at nýta ein virðisbrævamarknað til at einskilja eitt nú Føroya Fiskavirking orsaka av, at søla á henda hátt tryggjar greiðar mannagongdir, fult gjøgnumskygni, at øll fáa møguleika at bjóða, at selt verður til marknaðarprís v.m.

Íslendska loysnin – ein føroysk heimasíða

Men hóast vit hava møguleika fyri, at skipa okkara egna føroyska virðisbrævamarknað – tó undir danskari lóggávu í fyrsta umfari – sum síðan kundi samstarvað við útlendskar virðisbrævamarknaðir, so varð onnur loysn vald. Á komandi »føroyska« virðisbrævamarknaðinum fara føroyskar fyritøkur, at kunna skráseta seg á íslendska virðisbrævamarknaðinum, eins og føroyingar fáa høvi til, at keypa og selja partabrøv á íslendska marknaðinum. Hetta hava føroyingar og føroyskar fyritøkur eisini møguleika fyri í dag, men munurin er, at tað í næstum verður møguligt umvegis eina føroyska heimasíðu.

Tað einasta sum verður føroyskt við »føroyska virðisbrævamarknaðinum« verður sostatt heimasíðan.

Óvirðilig loysn

Havandi í huga, at tað er eitt partafelag – har stórur partur av landsins størstu felogum og fyritøkum eru partaeigarar –ið skal reka komandi virðisbrævamarknaðin, er ein orsøk til at íslendska loysnin varð vald óivað, at henda skipan er bíligast og lættast at reka fyri partafelagið.

Tað hevið tó verið ynskiligt, um hægri mál vórðu sett, og at størri dentur varð lagdur á, at vit í Føroyum eiga at skipa egnan føroyskan virðisbrævamarknað m.a., fyri at byggja upp vitan og førleika á økinum soleiðis, at Føroyar – eins og øll onnur framkomin lond – kunnu verða skipaðar og framkomnar eisini á virðisbrævaøkinum – hóast talan er um ein lítlan marknað.

Ætlanin við, at kalla tað, at føroyingar fáa møguleika fyri, at gera íløgur, skráseta fyritøkur v.m. á íslendska virðisbrævamarknaðinum umvegis eina føroyska heimasíðu fyri ein »føroyskan virðisbrævamarknað«, er eftir mínum tykki ein óvirðilig loysn og átti at verið umhugsað, hvørt tað er rætt, at kalla íslendsku loysnina fyri ein føroyskan virðisbrævamarknað.

Menna einar sjálvstøðugar Føroyar

Vit eiga støðugt at menna samfelag okkara til at geraast enn meira framkomið og sjálvstøðugt, og ein liður í hesi menning er, at seta á stovn egnan virðisbrævamarknað, ið vil fremja einar dynamiskar og produktivar Føroyar og harvið fremja økt virksemi, virðir og vælferð í Føroyum.

Vónandi verður núverandi ætlan, ið er, at gera ein komandi føroyskan virðisbrævamarknað íslendskan, løgd til síðis, til frama fyri at skipa ein veruligan føroyskan virðisbrævamarknað.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fríi. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-friggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

UTTAN ÚR HEIMI

Svøríki illa fyrireikað

Ein nýggj frágreiðing hjá svensku verjuni kemur til ta niðurstøðu, at Svøríki er illa fyrireikað til eitt møguligt yvirgangsálop.

Í frágreiðingini stendur, at svenska verjan er soleiðis háttað, at eindir hennara eru tungar og seinførar og tí illa egnaðar til at forða fyri einum yvirgangsálopi og tíansheldur at hevna tað skjótt.

Tey, sum hava skrivað frágreiðingina, vísa á, at svenski herurin er bara arbeiðsførur einar tveir mánaðir um árið. Tað er beint eftir nýggjár, tá nýggir hermenn eru lidnir við sína hertænastu.

Fekk 50 ára fongsul

Ein 16 ára gamal amerikanskur drongur er dømdur 50 ára fongsulsrevsing fyri at hava skotið tveir ungdómar til deyðis og sært trettan aðrar á einum skúla í Kalifornia í fjør.

Rætturin fjørdi eisini av, at drongurin kann ikki royndarleyslatast, fyrr enn hann verður 65 ár, og tað ber í sær, at hann skal sita í fongslinum øll 50 árini. Tann 16 ára gamli fór at gráta, tá dómarin las úrskurðin, og hann bað avvarðandi hjá teimum, sum hann skjeyt, um umbering. Ungfólk, sum sóu drongin skjóta, hava greitt frá, at hann brosaði, tá hann lat skotini av.

Verjarnir høvdu biðið rættin døma tann 16 ára gamla 35 ár í fongsul, meðan ákæruvaldið hevði kravt 425 ára fongsul, sum var harðasta revsing, sum hann kundi fáa.

Snýtti íleggjarar

Ein norskur ríkisborgari varð mikudagin dømdur hálvt fjórða ára fongsul á Bermuda fyri at hava snýtt nakrar íleggjarar fyri meiri enn eina millión dollarar.

Norðmaðurin, sum er síðst í tríatiárunum, hevur játtað seg sekan. Sambært ákæruvaldinum hevði hann lumpað fólk til at rinda sær meiri enn eina millión dollarar. Pengarnar skuldi hann seta í partabrøv, og hann hevði vissað íleggjararnar um, at teir fóru at fáa í minsta lagi 110 prosent aftur.

Undir rættarmálinum kom fram, at norðmaðurin hevði ikki nýtt ein einasta dollara til partabrøv, men at hann í veruleikanum hevði nýtt pengarnar til eina marglætistilveru á Bermuda og til ferðir til Evropa og USA.

Krúnprinsar floksfelagar

Í heyst fer norski krúnprinsurin Haakon til London, har hann skal ganga í London School of Economics and Political Science. Útbúgvingin er liður í fyrireikingunum til, at Haakon einaferð skal taka við sum norskur kongur.

Men hann verður ikki tann einasti í flokkinum, sum fyrireikar seg til at taka við sum ríkisleiðari. Tað vísir seg nú, at millum floksfelagar hansara í London verður ein ungur maður úr Libya, Seif al-Islam Gaddafi, sum er sonur sjálvan libyska leiðaran Muammar Gaddafi.

Tann 30 ára gamli forsetasonurin er útbúgvin arkitektur og verkfrøðingur, og hann sigst vera tann, sum skal taka við eftir faðirin sum libyskur leiðari.

Tað slepst ikki undan kríggi við Irak

So avgjørd er Condoleezza Rice, trygdarráðgevi hjá George W. Bush, forseta. Samstundis ávara alt fleiri amerikanska forsetan ímóti at fullføra ætlan sína

USA-IRAK
Árni Joensen:

Tað var í samrøðu við bretska BBC, at Condoleezza Rice segði, at USA sleppur ikki undan kríggi við Irak, tí amerikanska stjórnin hevur ikki annað í at velja enn at taka eina endaliga uppgerð við Saddam Hussein, forseta. Í samráðuni segði hon, at minst tvær ferðir hevur Irak roynt at útvega sær kjarnorkuvápn, men hon segði kortini ikki, nær hetta hevur verið.

Condoleezza Rice verður vanliga mett at hava somu hugsjónir sum Dick Cheney, varaforseti og Donald Rumsfeld, verjumálaráðharri, sum báðir taka undir við at reka Saddam Hussein frá.

– Hetta er ein óndur maður, sum er til reiðar at gera sínum egna fólki og sínum grannalondum ilt. Fær hann fatur á hópoyðingarvápnum, fer hann at raka okkum øll. Grundgevingarnar fyri at fáa eitt leiðsluskifti í Irak eru fleiri og góðar, segði Condoleezza Rice. Hon vísti á, at irakski leiðarin hevur nýtt kemisk vápn ímóti sínum egna fólki og ímóti sínum grannum, og at hann hevur myrt irakar í túsundatali. Harafturat gevur hann loftverjuni boð um at skjóta eftir flogførum, sum hava eftirlit við flogbanninum hjá ST, og í samráðingum við ST letst hann, sum var tað hann, sum vann Flógvakríggið.

– Søgan hevur fleiri dømi um, at líkasæla kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri heimin, ávaraði Condoleezza Rice.

Ávara ímóti

Brent Scrowcroft, sum var trygdarráðgevi hjá George Bush eldra, ávarar harafturímóti tann yngra Bush ímóti at leypa á Irak. Í einari grein í blaðnum Wall Street Journal skrivar Brent Scowcroft, at eitt amerikanskt álop á Irak hevði borið í sær, at heimurin hevði gloymt bardagan ímóti yvirganginum.

– Tað, sum verri er, er, at allur heimurin er næstan á einum máli um, at tað hevði verið skeivt at lopið á Irak nú, skrivar gamli trygdarráðgevin.

Í Bretlandi veksur móttstøðan ímóti amerikansku álopsætlanini støðugt. Tann harðasta atfinningin higartil kom frá tí roynda Labour-politikaranum Gerald Kaufman í einari grein í blaðnum The Spectator í vikuni:

– Bush, sum er tann minst vitandi amerikanski forsetin, sum eg havi hitt í mínum politiska lívi, er umgyrdur av ráðgevum, hvørs kríghugur ber boð um tvørrandi politiskan, hernaðarligan og diplomatiskan kunnleika, skrivaði Gerald Kaufman.

Samstundis vísir tað seg, at kurdarnir í Irak hava lítlan og ongan hug at taka undir við amerikansku álopsætlanunum. Teir bera ótta fyri, at teir verða sleptir upp á fjall. Blaðið New York Times skrivaði í gjár, at tá umboð fyri útlagnu iraksku andstøðuna vóru í Washington seinasta vikuskiftið, hevði amerikanska stjórnin boðið tí máttmikla kurdaleiðaranum Massoud Barzani við á fundin, men hann tók ikki av innbjóðingini.

Amerikanskir hernaðarráðgevar hava fyrr sagt, at júst kurdarnir í Norðurirak eru ein týðandi liður í amerikansku ætlanini at fella Saddam Hussein.

Ringasta vatnflóðin í 150 ár

Í gjár var vatnið í ánni Elben níggju metrar oman fyri tað vanliga, og vatnflóðin er sostatt tann ringasta har síðani 1845

Ein stórur partur av týska býnum Dresden stendur undir í vatni, og myndugleikarnir bera ótta fyri, at Elben-áin fer at veksa uppaftur meiri. Kvinnan á byrgingini tykist hava mist allar vónir.

VATNFLÓÐ Í EVROPA
Árni Joensen

Í 1845 fór vatnið í Elben 8,77 metrar upp um tað vanliga, men so minkaði áin aftur. Í gjár fór Elben níggju metrar upp um ta vanliga, men hesaferð vóru eingi tekin til, at áin fór at minka, heldur tvørturímóti.

Hóskvøldið noyddust myndugleikarnir í Dresden at flyta 30.000 fólk burtur úr summum býarpørtum, og í býunum Bitterfeld og Magdeburg fingu 35.000 fólk boð um at vera til reiðar at fara úr húsum sínum, gerst tað neyðugt.

Tað hevur vístseg, at nógvar av byrgingunum, sum vóru ætlaðar at verja tann gamla býarpartin í Dresden, vóru ov lágar, og tí hava bjargingarmenn og hermenn lagt sandsekkir oman á tær gomlu byrgingarnar.

Týsku myndugleikarnir ávaraðu í gjár um, at Elben ivaleyst fer at veksa uppaftur meiri, tí áin er framvegis ógvuliga stór longur uppi inni í grannalandinum Kekkia.